Nr. 111/2019

Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um veruliga kostnaðin og mist størv av at flyta netbanka og peningaupplýsingarnar hjá føroyingum av landinum, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu nógv størv vóru á P/F Elektron hvørt árið frá og við 2004 til 2020?

2. Hvussu nógv hava føroysku peningastovnarnir rindað árliga í krónum og oyrum til útlendskar skipanir og fyritøkur fyri netbanka- og gjaldsskipanir hvørt árið frá og við 2004 til 2020?

3. Hvussu nógv kostaði sjálv flytingin og umleggingin av netbanka- og gjaldsskipanum í krónum og oyrum, tá ið skipanarraksturin varð fluttur í 2010 – fyri peningastovnarnar og fyri føroyskar fyritøkur?

4. Hvussu verða kostnaðurin og gjøldini til útlendsku netbanka- og gjaldsskipanirnar gjørd upp? T.e. tá ið landsstýrismaðurin áður hevur upplýst, at peningastovnarnir rinda 55 mió.kr. árliga til útlendsku skipanirnar, rindar so føroyski brúkarin harafturat eyka gjøld til útlendsku skipanirnar fyri hvørja einstaka tænastu og nýtslu?

5. Um svarið er játtandi til spurning 4, hvussu nógv verður goldið úr Føroyum tilsamans árliga til netbanka og gjaldsskipanir uttanlands (gjøld hjá peningastovnum + brúkaragjøld hjá vinnu og borgarum fyri hvørja tænastu og hvørja ítøkiliga nýtslu)?

6. Hvussu nógv hava føroysku peningastovnarnir bundið seg til at rinda til útlendsku fyritøkurnar í krónum og oyrum í dagsins prísum í mun til prosentbindingar í sáttmálum, um skipanirnar verða tiknar heimaftur?

7. Hvussu eru ognarviðurskiftini sett saman og broytt síðan 2010 í teimum fyritøkum uttanlands, sum føroysku peningastovnarnir hava sínar netbanka- og gjaldsskipanir í (M.a. SDC, NETS, BED, PBS, Visa og ATM-skipan, NEM-id, Porto to deildarnet og IBM-avgreiðsluskipanin)?

8. Hvørjar møguleikar hava føroyskir myndugleikar at tryggja føroyskum borgarum síni rættindi og møgulig endurgjøld, um svik ella villur fara fram í

teimum útlendsku skipanunum, sum raka føroyskar borgarar og vinnufyritøkur?

Viðmerkingar:
15. juni 2020 svaraði landsstýrismaðurin skrivligum fyrispurningi frá undirritaða um kostnaðin og mist størv av at flyta netbanka- og gjaldsskipanir hjá peningastovnunum av landinum.

Í svarinum kom fram, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevði biðið peningastovnarnar um at greina kostnaðirnar, ið spurt varð um, men at hetta ikki hevði verið møguligt áðrenn freistina at svara spurninginum.

Undirritaði gjørdi undir orðaskiftinum greitt, at svarini vóru ikki fullfíggjað, og at nýggir spurningar fóru at verða settir til tess at lýsa málið til fulnar.

Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 19. juni 2020

Høgni Hoydal